Pallar og hjálparskip eru ikki í arbeiði alt árið. Skálafjørðurin hóskar avbera væl at hava hesi liggjandi inntil arbeiðið verður tikið uppaftur. Hetta er mál, sum styrið fyri Kongshavnar Havn í framtíðini kemur at viðgera nágreiniliga.

Oljuvinnan – eitt ævintýr, ið kann geva okkum stóran vinning, men sum eisini fullkomiliga kann koma at kollvelta sam felag okkara, ansa vit ikki eftir. Aminningarnar trutu ti ikki í Aberdeen, dagarnar, føroyingar vóru har

OFFSHORE EUROPE 1991 –

– Hava Føroya størsta og besta fjørð til oljuvinnu

– Kunnu átaka okkum at umvæla og hava hjálparskip og boripallar liggjandi, tíðina á árinum, tey ikki eru í bróki, sigur Otto Petersen í Saltnesi, sum umboðaði Nes kommunu á oljuráðstevnuni í Aberdeen í farnu viku.

Otto Petersen, Saltnesi, bygdaráðslimur í Nes kommunu og formaður í nevndini fyri Kongshavnar Havn, taldist millum teir meira enn 60 føroyingarnar, ið vóru á OFFSHORE EUROPE-ráðstevnuni í Aberdeen í farnu viku.

Sum skipari á oljutangaskipinum «Stathav» hjá STATOIL í Føroyum, er Otto Petersen kunnugur við oljuvinnu, so einki løgið var, um hann fór á hesa ráðstevnu. Men tað var kortini ikki sum slíkur, hann fór. Hann umboðaði Nes søknar kommunu, sum var ein av teim mongu kommununum, ið tóku av tilboðnum at lata seg umboða.

– Nes kommuna gjørdi av at senda eitt umboð til Aberdeen til tess at vita, hvørjir møguleikar eru at útvega kommununi arbeiði innan oljuvinnuna, sigur Otto Petersen.

Hann sigur, at kommunustýrislimirnir fingu upplýsingar um leiting og tann útbúnað, nýttur verður at leita við. Vitjað varð m. a. á einum boritorni í Inver Gordon. Somuleiðis varð vitjað á skúlunum, har lært verður at bora og vand vera ymist trygdartiltøk.

– Trygdarkrøvini gerast sum fráliður alt strangari. Talan er um viðbrekin evni. Ansast má eftir, at tey ikki verða blandað, tí so er spreingivandi á ferð. Teir verða hart skúladir, sum fara í oljuvinnuna. Einans tað at koma út á boripallarnar krevur skeið í minst fimm dagar, sigur Otto Petersen.

Bestu fortreytir

Sum kommunustýrislimur hugsar ein fyrst og fremst um arbeiðspláss.

– Sum støðan er, minkar virksemið í Føroyum nógv, og fáa føroyingar lut í oljuvinnuni – við annaðhvørt at fara uppí hjá øðrum ella at vinna olju sjálvir – er Skálafjørðurin ein náttúrlig havn til ymiskt virksemi í tí sambandi, sigur Otto Petersen.

Suðuroyggin liggur annars næst teimum økjum, ið umtalað eru í sambandi við oljuboring. Og hagar er stytsta leið at fara við tólum og hjálparskipum at fáa umvæling. Men Otto Petersen leggur í hesum sambandi dent á, at Skálafjørðurin hevur bestu fortreytirnar. Fjørðurin er langur, breiður og djúpur.

– Teir boripallarnir, sum lógu inni í Inver Gordon, kundu eins væl ligið á Skálafjørðinum, sigur hann.

Størsti og besti

Vágur, Tvøroyri ella Skálafjørðurin? Líkamikið! tann sum fær part í hesum ævintýri, ið tykist liggja fyri framman, hevur arbeiði at bjóða borgarum sínum, og ikki so lítið fáa kommunurnar av havnapengum burturúr at hava hjálparskip (supply-skip) liggjandi.

– Í Aberdeen fingu vit tó áminning um: «Verið ikki ov skjótir. Arbeiði verður til mangar hendur meðan leitað verður, men so minkar tað aftur.» Tað ræður um at hugsa seg væl um og fyrireika seg væl, sigur Otto Petersen.

Boripallarnir eru ikki í bróki alla tíðina. Skulu teir bora vestan fyri Skotland og á leiðunum kring Føroyar, verður hetta arbeiði at fara fram summarhalvárið. Síðan liggja teir og hjálparskip teirra í góðari, tryggari havn til arbeiðið verður tikið uppaftur.

– Hetta er mál, sum vit koma at taka upp í havnastýrinum fyri Kongshavnar Havn, um vit á Skálafjørðinum skulu bjóða okkum at goyma pallar og skip inntil tey aftur skulu í arbeiði.

– Vit hava Føroya størsta og besta fjørð, sigur Otto Petersen. **pn**

Mynd: Hilmar J. Hansen

Otto Petersen, Saltnesi, bygdaráðslimur, umboðaði Nes kommunu á oljuráðstevnuni í Aberdeen.

Vilhjálmur Gregoriussen, námsfulltrúi:

Ein spennandi avbjóðing

»Dynamic Position Course« er heitið á skeiðnum, sum føroyingum nú stendur í boði at melda seg til

Føroyingar hava nú møguleikan at melda seg til eitt 3 mánaða langt skeið innan oljuvinnuna. Hetta skeið verður væntandi seinast í hesum árinum ella fyrst í komandi ári. «Dynamic Position Course» er heitið á skeiðnum og í fyrstu syftu sleppa 6 føroyingar at royna seg.

Aðrenn tú sleppur á skeiðið skal tú hava onkra útbúgving, og Vilhjálmur Gregoriussen, námsfulltrúi á Landsskúlafyrisitingini, sigur við Dimmalætting, at ætlanin er at senda 6 mans á skeiðið. 3 skipsførarar og 3 maskinmeistarar eru teir fyrstu, ið sleppa at royna. Skeiðið fer fram á landi og sjálvandi umborð á onkrum boriplattformi.

– Henda fyrsta royndin at senda fólk úr Føroyum á skeið innan oljuvinnuna, er sjálvsagt ein fyribils roynd. Talan er um olju í føroysku undirgrundini og í hesum sambandi er tað føroyingum sera viðkomandi, sigur Vilhjálmur. Hetta er eisini sera gott, tá ein hugsar um okkara nógva arbeiðsloysið her á landi.

Skipsførarar og maskinmeistarar hava fingið sendandi tilfar viðvíkjandi útbúgvingini og teir siga seg vera førar fyri at lúka tær treytir, ið kravdar verða fyri at koma á skeiðið. Men fyribils hevur ongin so meldað seg á Landsskúlafyrisitingini.

Nógvar møguleikar

Aftaná skeiðið hevur tú so møguleikan at fáa ein kjans umborð á onkrum plattformi. Vilhjálmur greiðir frá, at nógvir av plattformunum ikki eru ankraðir og tískil virka sum eitthvørt skip, við «stabiliteti» og tílíkum. Og í hesum sambandi skal tú fyrst hava eina útbúgving áðrenn tú kanst melda teg til.

Skeiðið er sera kostnaðarmikið. Fyri eina viku skal tú gjalda umk. 300 $, og í føroyskum krónum er hetta umk. 3.400,00 krónur, so fyri 3 mánaðir skal tú gjalda góðar 40.000 krónur. Men Vilhjálmur sigur, at Landsstýrið hevur sett pengar av í ein grunn til ymiskt í sambandi við møguliga oljuvinnu í Føroyum, og henda grunn kann ein so søkja um stuðul.

Gott alternativ

Spurdur um sína persónligu meining um hetta tiltakið, sigur Vilhjálmur, at hann heldur hetta vera sera áhugavert, og at hetta er eitt gott alternativ fyri arbeiðsloysið í Føroyum.

– Skuldi eg valt út millum umsøkjararnar, so vildi eg valt fólk við góðum kunnleika í enskum, tí øll undirvísing fer fram á enskum og er hon sera konsentrera í hesar 3 mánaðar, sigur Vilhjálmur.

– Nú kann eg bert úttalað meg um skipsførararnar og teir haldi eg eru væl fyri fakliga í skipsførararoyndum, og við hollum kunnleika í enskum, trúgvi eg teir klára at koma ígjøgnum.

Hóast lýsingin eftir fólki hevur verið í blóðunum, so hevur ongin meldað til. Tilmeldast skal til Landsskúlafyrisitingina. **D**

Vilhjálmur Gregoriussen, námsfulltrúi á Landsskúlafyrisitingini, heldur hesa útbúgving vera sera spennandi og ógvuliga viðkomandi, nú talan er um olju í føroysku undirgrundini

Í sambandi við samtakið, Offshore Europe 91, sum verið hevur í Aberdeen í døgunum 3. til 6. september, hava føroyingar nú fingið møguleikan at melda seg til 3 mánaða skeið innan oljuvinnuna, »Dynamic Position Course«

STATENS PRÆMIEOBLIGATIONSLÅN 1954/99

Røde obligationer med serienumre 1001-3000 og løbenumre 2001-3000 incl.
74. trækning september 1991
Følgende præmier er udtrukket

	serie nr	løbe nr	serie nr	løbe nr	serie nr	løbe nr	serie nr	løbe nr	serie nr	løbe nr	serie nr	løbe nr
250.000 kr.	**2442**	2071										
100.000 kr.	**1232**	2196	**1958**	2044	**2408**	2777						
50.000 kr.	**1486**	2825	**2060**	2911	**2119**	2266	**2322**	2384	**2641**	2342		
25.000 kr.	**1242**	2298	**1646**	2633	**1773**	2740	**2468**	2847	**2604**	2519		
	1280	2832	**1760**	2276	**2228**	2654	**2549**	2886	**2740**	2336		
10.000 kr.	**1111**	2140	**1437**	2773	**1627**	2115	**2043**	2753	**2338**	2808	**2665**	2287
	1128	2294	**1439**	2274	**1713**	2912	**2196**	2763	**2612**	2399	**2699**	2160
	1161	2209	**1524**	2493	**1787**	2163	**2319**	2257	**2631**	2619	**2894**	2167
	1194	2758	**1541**	2760								
5.000 kr.	**1046**	2016	**1537**	2490	**1834**	2788	**2088**	2572	**2675**	2589	**2884**	2436
	1076	2873	**1552**	2056	**1878**	2012	**2159**	2352	**2708**	2103	**2909**	2948
	1250	2143	**1618**	2366	**1923**	2862	**2271**	2823	**2721**	2355	**2923**	2215
	1295	2269	**1713**	2578	**2020**	2603	**2289**	2170	**2757**	2934	**2928**	2217
	1307	2478	**1734**	2903	**2027**	2065	**2402**	2041	**2863**	2898	**2954**	2746
	1438	2582	**1780**	2100	**2044**	2388	**2546**	2003	**2881**	2887	**2959**	2237
	1475	2030	**1807**	2868	**2055**	2648	**2634**	2451				
1.000 kr.	**1333**	2267	**1616**	2285	**1904**	2954	**2096**	2776	**2450**	2789	**2794**	2732
	1354	2387	**1651**	2357	**1907**	2575	**2135**	2908	**2503**	2761	**2806**	2394
	1373	2830	**1655**	2448	**1913**	2132	**2176**	2097	**2519**	2112	**2810**	2215
	1374	2974	**1660**	2145	**1977**	2538	**2239**	2188	**2545**	2497	**2820**	2454
	1423	2039	**1668**	2679	**1978**	2109	**2319**	2515	**2553**	2881	**2839**	2875
1087	2140	**1428**	2392	**1686**	2601	**1986**	2994	**2330**	2326	**2573**	2213	**2843**	2876
1113	2343	**1438**	2404	**1728**	2537	**2000**	2039	**2334**	2431	**2577**	2616	**2855**	2580
1120	2749	**1438**	2998	**1758**	2046	**2008**	2681	**2335**	2452	**2610**	2498	**2858**	2703
1131	2027	**1442**	2478	**1758**	2311	**2016**	2642	**2360**	2564	**2620**	2784	**2880**	2482
1139	2066	**1458**	2098	**1805**	2948	**2034**	2180	**2377**	2795	**2643**	2976	**2908**	2796
1166	2911	**1478**	2154	**1806**	2864	**2050**	2174	**2379**	2445	**2658**	2964	**2921**	2741
1243	2083	**1506**	2956	**1850**	2080	**2053**	2487	**2385**	2736	**2731**	2253	**2926**	2448
1275	2259	**1536**	2229	**1873**	2023	**2057**	2501	**2388**	2863	**2749**	2638	**2937**	2956
1316	2309	**1546**	2015	**1880**	2290	**2066**	2315	**2407**	2581	**2781**	2982	**2983**	2679
1317	2237	**1547**	2412	**1895**	2695	**2076**	2804	**2409**	2332	**2786**	2527	**2987**	2112
500 kr.	**1247**	2936	**1495**	2672	**1770**	2798	**1949**	2840	**2267**	2413	**2651**	3000
	1279	2378	**1498**	2826	**1776**	2544	**1967**	2579	**2269**	2927	**2676**	2509
	1295	2082	**1512**	2729	**1776**	2620	**1969**	2015	**2288**	2565	**2717**	2306
	1306	2610	**1528**	2540	**1781**	2907	**1979**	2174	**2295**	2566	**2732**	2266
	1309	2962	**1595**	2810	**1788**	2606	**1983**	2495	**2389**	2779	**2732**	2852
1094	2695	**1343**	2004	**1606**	2615	**1797**	2692	**1996**	2477	**2437**	2268	**2773**	2739
1099	2021	**1381**	2401	**1612**	2430	**1799**	2673	**2018**	2701	**2450**	2130	**2802**	2018
1113	2533	**1393**	2223	**1679**	2757	**1810**	2850	**2051**	2902	**2457**	2397	**2812**	2935
1129	2049	**1397**	2258	**1687**	2026	**1812**	2073	**2069**	2032	**2466**	2160	**2863**	2782
1154	2882	**1399**	2072	**1699**	2606	**1824**	2353	**2162**	2252	**2479**	2087	**2897**	2563
1158	2771	**1408**	2456	**1714**	2711	**1837**	2111	**2163**	2203	**2486**	2058	**2922**	2570
1183	2367	**1426**	2754	**1726**	2562	**1902**	2026	**2172**	2727	**2494**	2650	**2961**	2532
1201	2943	**1455**	2882	**1728**	2120	**1904**	2579	**2188**	2216	**2547**	2470	**2967**	2368
1212	2193	**1475**	2342	**1734**	2640	**1907**	2795	**2202**	2173	**2555**	2696	**2971**	2443
1213	2225	**1487**	2393	**1742**	2691	**1943**	2568	**2225**	2871	**2614**	2328	**2993**	2247
100 kr.	Alle obligationer med løbenummer 2341 eller løbenummer 2826 uanset serienr.											

Numrene på ikke indløste præmier fra de seneste fem trækninger vil, ligesom samtlige ovenstående numre, blive opført i den officielle trækningsliste, som kan købes for 3,00 kr. i bladudsalgene. Trækningslisten vil ligge til eftersyn på alle posthuse. **Præmieudbetalingen finder sted i Danmarks Nationalbank og udvalgte posthuse fra d. 11. september d. å.** Trækningslister kan leveres på databærende medier ved henvendelse til DATA-SATS informatik A/S (telf. 42 52 21 00).

Kongeriget Danmarks Hypotekbank og Finansforvaltning
Landgreven 4, 1301 København K. Telefon 33 92 80 00